

## Kongafiskaveiða í Irmingarhavinum

Londini í NEAFC eru vorðin samd um kongafiskaveiðuna í Irmingahavinum. - Støðan hjá kongafiskastovninum er so vánalig, at nakað má gerast, men at semjast um nakað skilagott sær út til at vera vónleyst. Tað skrivar Føroya Reiðarafelag á síni heimasíðu. Felagið vísir á, at sjálvandi vilja allir fiska so nógv sum gjørligt, tó eru londini noydd at vísa skynsemi, tá hini londini eru samd um at minka veiðina. Í einum kassa á gýtingarleiðini hevur veiðan verið avmarkað, og nú samdust londini um at minka fiskiskapin úr 30% niður í 15 % í tíðarskeiðinum 1. apríl til 10. mai. - Hetta er besta fiskitíðin, og tað er við ringum tannabiti, vit góðtaka hetta. Loyvt verður at fiska 597 tons ímóti 722 tonsum, sum vóru veidd í fjør í sama øki sama tíðarskeið. Felagið vísir á, at annars var semja í NEAFC um at økja veiðina úr 65% uppí 70% av 3.980 tonsum í sama kassa, men í áðurnevnda tíðarskeiði verður bert talan um 15% veiði á hesi leið. - Tá liðugt var, segði Emanuel Rosing fyri Grønland, at nú vóru allir glaðir , "undtagen rødfisken". Hetta er sannleikin, tá hugsað verður um støðuna í stovninum, sigur Føroya Reiðarafelag.

# Havgøltur nýggja fiskaslagi

**Í fjør tók Havsbrún ímóti sløkum 11.000 tonsum av fiskaslagnum havgølti, sum er rættiliga nýtt í framleiðsluni á virkinum. Enn er trupult at siga, hvønn týdning nýggja fiskaslagið kann koma at fáa fyri ráfiskagrundarlagið hjá virkinum, sum alsamt er minkandi við nógv skerdari svartkjaftakvotu hjá føroysku nótaskipunum**

HAVSBRÚN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Higartil í ár hevur Havsbrún í Fuglafirði tikið ímóti sløkum 14.000 tonsum av ráfiski. Tað er ikki meira enn ein vika gav í nøgd, tá føroysku svartkjaftaskipini hesa tíðina av árinum kundu fiskað, sum tey vildu*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




Fyri nøkrum árum síðan tók Havsbrún í Fuglafirði ímóti fyrstu nøgdunum av einum "nýggjum" fiskaslagi, sum á enskum kallast boarfish. Føroyska navnið á hesum fiski er havgøltur.

Fyrstu fiskarnir av hesum slagi, sum Hartvig Joensen á Havsbrún veit um at siga, fekk nótaskipið Christian í Grótinum, tá teir royndu eftir rossamakreli í Ensku Kanalini. Tá hevði nótaskipið, sum ikki er í føroyska fiskiskipaflotanum meira, eina íblanding av havgølti, sum teir landaðu í Fuglafirði.

### Smáur fiskur

Í fjør keypti Havsbrún út við 11.000 tons av havgølti, og higartil í ár hevur virkið eisini keypt onkra last.

Tað eru írsku systirskipini, Father McKee og Brendelen, sum serliga hava fiskað havgølt á leiðunum sunnanfyri Írland og niðri móti Ensku Kanalini. Skipini hava roynt at funnið keyparar ymsastaðni, og Havsbrún í Fuglafiðri hevur víst fiskaslagnum áhuga.

Havgøltur er smáur fiskur. Eg slagið gott, liggur støddin millum 10 og 13 cm., men er fiskurin smáur, er longdin einar 5-6 cm. Fiskurin minnir um kongafisk í skræðuni; hann er nakað hvassur, og tí er hann eisini ringur at fáa upp úr skipinum. Neyðugt er at brúka nógv vatn, tá havgøltur verður landaður.

Hartvig sigur, at tá írsku skipini hava landað hetta fiskaslag á Havsbrún, hevur hetta verið rein veiða við ongari íblanding.

Áðrenn vit gera meira burtur úr havgølti, kunnu vit upplýsa, at hesi somu írsku skipini í vikuni hava landað tilsamans 2200-2300 tons av sild til Havsbrún.

### Á royndarstigi

Enn er trupult at siga nakað við vissu um hvønn týdning hetta nýggja fiskaslagið, sum enn er á royndarstigi í framleiðsluni, kann koma at fáa fyri ráfiskagrundarlagið hjá Havsbrún.

Nú svartkjaftakvotan hjá føroysku nótaskipunum er vorðin so nógv skerd, er ráfiskagrundarlagið undir Havsbrún eisini viknað.

- Vit kunnu siga, at neyð lærir nakna kvinnu at spinna, og tað er betri at gera hesar royndir enn einki at gera. Sjálvandi eru vit spentir eftir at vita, hvussu langt vit kunnu røkka við hesum fiskaslagi, sigur Hartvig.

Hann vísir á, at enn er langt á mál við havgølti og framleiðslu úr hesum fiskaslagi.

- Men soleiðis var eisini við svartkjafti, tá líkinda søluvøra skuldi fáast burtur úr honum.

Hartvig sigur, at tað verður trupult at fáa somu dygd burtur úr havgølti sum úr øðrum fiskasløgum, sum Havsbrún brúkar í síni framleiðslu.

- Vit hava gjørt royndir at virka fiskin til mjøl og partvís til lýsi, tí okkurt tíðarskeið er fiskurin hampiliga feitur og ber nokso fitt av lýsi. Men enn er havgøltur ikki vorðin ein beinleiðis partur av fóðurframleiðsluni hjá virkinum.

Hann sigur, at Havsbrún hevur gjørt innleiðandi kanningar við sýrum og øðrum, men slíkt arbeiði tekur langa tíð.

- Tað er í hvussu er einki í okkara kanningum, sum bendir á, at fiskurin ikki kann brúkast. Hinvegin klárar fiskaslagið ikki krøvini um eitt nú proteinir, og innihaldið av salti er ein annar trupulleiki.

Hartvig Joensen vísir á, at fiskamjøl í síni heild kann brúkast til so mong ymisk endamál, og eitt nú hevur virkið roynt at selt mjøl úr havgølti til Ruslands.

- Vit eru í øllum førum noyddir at royna nýggjar leiðir, nú ráfiskagrundarlagið er vorðið so skert, sigur hann.

### 14.000 tons

Higartil í ár hevur Havsbrún tikið ímóti stívliga 14.000 tonsum av ráfiski, og tað er ikki meira enn ein hampilig vika kundi geva hesa tíðina av árinum fyri fáum árum síðan.